# Heilsumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 2. januar 2023 |
| Mál nr.: | 23/10433-6 |
| Málsviðgjørt: | GMM |
| Ummælistíð: | N/A |
| Eftirkannað: | 25.11.2023 |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin)**
(Undantak fyri gjaldsskyldu, afturgjaldsreglur og heimild til innheinting av skuld o.a.)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Yvirskriftin yvir § 24 verður orðað soleiðis:

*"Gjald"*

**2.** Í § 24 verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. 2 sett:

"*Stk. 2.* Persónar, sum eru fevndir av stk. 1, men sum rinda heilsutrygdargjald í øðrum Norðanlandi vísandi til Nordisk konvention om social sikring, og sum ikki kunnu draga gjaldið frá, vísandi til skattalógina, kunnu eftir umsókn verða undantiknir gjaldskyldu. Undantøkan hevur virknað frá tí degi, umsóknin er móttikin. Tá ið umsøkjarin ikki longur rindar heilsutrygdargjald í øðrum Norðanlandi, hevur hann skyldu at boða Heilsutrygd frá hesum."
Stk. 2 og 3 verða eftir hetta stk. 3 og 4.

**3.** Í § 24 verður sum stk. 5 sett inn:

"*Stk. 5.* Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um viðurskifti viðvíkjandi umsókn og fráboðanarskyldu sambært stk. 2."

**4.** Í § 26 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:

"Til nýtslu í sambandi við umsókn um gjaldsfrítøku sambært § 24, stk. 2, kann Heilsutrygd útvega sær upplýsingar frá øðrum viðkomandi myndugleikum, undir hesum TAKS."

**5.** Í § 26 verða sum stk. 2 og 3 sett:

"*Stk. 2.* Hevur persónur givið Heilsutrygd skeivar upplýsingar ella tagt um umstøður, sum hava týdning fyri gjaldsfrítøku sambært § 24, stk. 2, kann Heilsutrygd eftirfylgjandi krevja

inn gjaldið, ið viðkomandi av órøttum ikki hevur goldið.
*Stk. 3.* Rindar ein persónur, ið er fevndur av løgtingslógini, ikki gjaldið innan ásettu freist, verður rentutilskriving framd. Rentutilskrivingin er 0,7% fyri hvønn byrjaðan mánað. Sama er galdandi fyri skuldskrivaða rentu."

**6.** Aftan á § 26 verður sett:

"*Innheinting av skuld*
**§ 26 a.** Heilsutrygdargjald og renta, ið er fallið til gjaldingar, kann verða innheintað við panting.
*Stk. 2.* TAKS fremur panting fyri heilsutrygdargjald og skuldskrivaða rentu eftir stk. 1, eftir reglunum fyri innkrevjing av skattum.
*Stk. 3.* Heimilað verður TAKS at innkrevja skuld og innkrevjingarkostnað sambært hesi løgtingslóg við at afturhalda í A-inntøku hjá teimum gjaldskyldugu sambært reglunum um hetta í Skattalógini."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2024.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Endamálið við hesum lógaruppskoti er at fáa samsvar ímillum Heilsutrygdarlógina og Nordisk Konvention om Social Sikring viðvíkjandi heilsutrygdargjaldi. Sambært lógaruppskotinum kunnu borgarar, ið rinda heilsutrygdargjald í øðrum Norðanlandi og sum ikki kunnu fáa frádrátt vísandi til skattalógina, við umsókn fáa undantak fyri at rinda heilsutrygdargjald. Hinvegin missir borgarin ikki rættindi til at fáa veitingar sambært § 1 í lógini.

Sambært Nordisk Konvention om Social Sikring hevur ein borgari ikki skyldu at rinda til sosiala skipan í meira enn einum landi, sum er fevnt av konventiónini. Tá føroyingur tí rindar til aðra sosiala skipan sum t.d. Folketrygd í Norra, hevur hann ikki eisini skyldu til at rinda heilsutrygdargjald í Føroyum. Hetta er í andsøgn við galdandi heilsutrygdarlóg, sum í § 24 ásetur, at øll, ið hava fylt 18 ár, og sum eru fevnd av lógini, gjalda 175 kr. um mánaðin umframt 0,70 % av skattskyldugu inntøku sínari til Heilsutrygd. Heilsutrygd hevur fylgt heilsutrygdarlógini og sostatt kravt heilsutrygdargjald sambært løgtingslógini; t.v.s. eisini frá borgarum búsitandi í Føroyum, sum arbeiða og rinda til sosiala skipan í øðrum Norðanlandi. Henda mannagongd hjá Heilsutrygd bleiv kærd til táverandi Kærunevnd í almanna- og heilsumálum, sum í november 2014 kom til ta niðurstøðu, at ein norðurlendingur sambært konventiónini bert kann verða kravdur eftir heilsutrygdargjaldi í einum limalandi, meðan tað sambært kærunevndini er ógreitt, eftir hvørjari limalandslóg gjald skal krevjast. Kærunevndin heimvísti tí málið til nýggja viðgerð. Heilsutrygd boðaði táverandi Heilsu- og innlendismálaráðnum frá, at Heilsutrygd tók avgerðina hjá kærunevndini til eftirtektar, men metti samstundis, at talan var um eitt heldur fløkt mál. Ósamsvar er millum heilsutrygdarlógina, sum Heilsutrygd umsitur og norðurlendsku konventiónina, og harvið eisini í hvønn mun viðkomandi borgarar hava rætt til at krevja inngoldna peningin aftur frá Heilsutrygd.

Sambært § 55 í stýrisskipanarlógini hevur løgtingslóg, ella partur av løgtingslóg, ikki gildi, um hon gongur ímóti millumtjóðasáttmála, sum heimastýrið hevur gjørt við onnur lond, og sum eisini fevnir um Føroyar. Táverandi heilsu- og innlendismálaráðið metti, at heilsutrygdarlógin var í stríð við altjóða sáttmála, sum Løgtingið hevur samtykt, og tí legði táverandi landsstýrisfólk í heilsu- og innlendismálum lógaruppskot fyri Løgtingið um at broyta heilsutrygdarlógina, soleiðis at samsvar kundi fáast ímillum heilsutrygdarlógina og Nordisk konvention om social sikring. Sambært lógaruppskotinum kundi borgarin í ávísum førum blíva undantikin frá at rinda heilsutrygdargjald sambært § 24, men samstundis missir borgarin ikki rættindini til at fáa veitingar sambært § 1 í lógini. Lógaruppskotið fall tó burtur, og sostatt er tað enn ósamsvar millum heilsutrygdarlógina og Nordisk konvention om social sikring.

*Rættarmálið hjá "útisiglarunum" móti Heilsutrygd (stutt og einfaldað versión)*

Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum hevur givið borgarum, ið sigla við skipi undir norskum flaggi, viðhald í at Heilsutrygd av órøttum hevur kravt inn heilsutrygdargjald frá útisiglarum, ið eru fevndir av Nordisk konvention om social sikring. Heilsutrygd hevur tó ikki afturgoldið útisiglarum heilsutrygdargjald við tað, at Heilsutrygd vísur á, at tað er greitt ásett í § 24, stk. 1 í heilsutrygdarlógini, at øll yvir 18 ár, ið eru búsitandi í Føroyum, skulu gjalda heilsutrygdargjald. Málið um afturrindan av heilsutrygdargjaldi endaði í Føroya Rætti á heysti 2021, har rætturin kom til ta niðurstøðu, at Heilsutrygd ikki hevur lógarheimild til at krevja heilsutrygdargjald frá persónum, ið longu hava goldið eitt gjald til eina sosiala skipan í einum øðrum landi, ið er fevnt av Nordisk konvention om social sikring. Málið bleiv síðani kært til Eystara Landsrætt, ið staðfesti dómin hjá Føroya Rætti. Heilsutrygd hevur í samráð við

sakførara avgjørt, umvegis Kamaradvokatin, at senda umsókn til Procesbevillingsnævnet um at fáa málið roynt í Hægsta Rætti.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Sambært § 24 í Heilsutrygdarlógini skulu øll, sum eru fylt 18 ár, og sum eru fevnd av lógini. gjalda 175 kr. um mánaðin umframt 0,70 % av skattskyldugu inntøku sínari til Heilsutrygd. Heilsutrygd hevur fylgt heilsutrygdarlógini og sostatt kravt heilsutrygdargjald sambært lógini; t.v.s. eisini frá borgarum búsitandi í Føroyum, sum arbeiða og rinda til sosiala skipan í øðrum Norðanlandi. Í galdandi løgtingslóg er ongin heimild hjá Heilsutrygd at gera undantak frá gjaldsskylduni. Hetta er ikki í samsvar við Nordisk konvention om social sikring, og tí er neyðugt við lógarbroyting í heilsutrygdarlógini.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Yvirskipaða endamálið við lógaruppskotinum er at fáa samsvar millum Heilsutrygdarlógina og Nordisk Konvention om Social Sikring. Við lógaruppskotinum kunnu føroyingar, ið gjalda til sosiala skipan í øðrum norðurlandi, ið er fevnt av Nordisk konvention om social sikring, søkja Heilsutrygd um at sleppa undan gjaldsskylduni í § 24 í galdandi Heilsutrygdarlóg, men missa tó ikki rættindi til at fáa veitingar sambært § 1 í lógini.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Løgtingið hevur samtykt at fylgja Nordisk konvention om social sikring, og tí er tað eisini av stórum týdningi, at føroyska lóggávan verður tillaga soleiðis, at hon samsvarar við millumlanda sáttmálan. Við lógaruppskotinum kann ein føroyingur, ið arbeiðir í einum norðurlandi, ið er fevnt av Nordisk konvention om social sikring, søkja um gjaldsfrítøku frá § 24 í heilsutrygdarlógini. Hetta er ikki gjørligt við verandi lóggávu, og tí er ósamsvar millum Heilsutrygdarlógina og Nordisk konvention om social sikring ið sigur, at ein borgari bert hevur skyldu til at rinda til sosiala skipan í einum landi.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Av tí at lógaruppskotið hevur stóran skund, hevur lógaruppskotið ikki verið til hoyringar.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Tað er trupult at meta nágreiniliga um, hvørjar fíggjarliga avleiðingar lógaruppskotið hevur. Hetta orsaka av, at tað í skrivandi stund ikki er møguligt at siga, hvussu nógvir føroyingar fara at søkja um undantak fyri at gjalda heilsutrygdargjald.

Heilsutrygd hevur mett um fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum til omanfyri nevndu lógarbroyting við støði í upplýsingum frá TAKS. Samlaða metingin vísir, at fíggjarligu avleiðingarnar av lógarbroytingini fara at verða umleið 3 mió. kr árliga.

Metingin er grundað á talið av føroyingum, sum arbeiða á sjógvi og landi í Norra. Tað eru eisini føroyingar í øðrum Norðanlondum, men nógv teir flestu arbeiða í Norra. Heilsutrygd metir, at um allir føroyingar umborð á norskum skipum frameftir søkja um at verða undantiknir gjaldskyldu til Heilsutrygd, hevur tað væntandi við sær eina lækking í heilsutrygdarinngjøldum á umleið 2 mió. kr. árliga.

Søkja allir føroyingar, sum arbeiða í Noregi á landi ella umborð á skipi, um at verða undantiknir gjaldskyldu til Heilsutrygd, vísa metingarnar, at tað hevur við sær eina lækking í inngjøldunum á umleið 3. mió. kr. árliga.

Heilsutrygd væntar, at tað fer at krevja umleið eitt ársverk at umsita og viðgera umsóknir um undantak fyri at rinda heilsutrygardargjald, og tann samlaði kostnaðurin av hesum er umleið 550.000-600.000 kr árliga.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar við sær fyri Heilsutrygd.

Um Heilsutrygd skal málsviðgera umsóknir um at sleppa undan at rinda heilsutrygdargjald, hevur tað nógv fyrisitingarligt arbeiði við sær, og fer tað at krevja meira starvsfólkaorku Tað er torført at meta um, hvussu nógv arbeiði verður í hesum. Tað veldst m.a. um, hvussu nógvir borgarar fara at søkja um undantøku, og hvussu nógv arbeiði verður úr hvørjari umsókn. Tað kann t.d. hugsast, at sami persónur frá tíð til aðra skal verða undantikin heilsutrygdargjaldi. Við hesum fyritreytum, og teimum óvissum sum eru, væntar Heilsutrygd, at tað fer at krevja umleið 1 ársverk at umsita.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið hevur ta avleiðing fyri vinnuna, at persónar fevndir av § 24, stk. 2, eftir umsókn kunnu sleppa undan at rinda heilsutrygdargjald í Føroyum.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur ta jaligu avleiðing, at persónar ið eru fevndir av § 24, stk. 2 eftir umsókn kunnu sleppa undan at rinda heilsutrygdargjald í Føroyum.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Lógaruppskotið hevur við sær, at samsvar verður fingið millum heilsutrygdarlógina og Nordisk konvention om social sikring.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
**1) Hoyvíkssáttmálin**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri Hoyvíkssáttmálan.

**2) Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar við atliti at EMRS.

**3) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar við atliti at Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, sum bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Lógaruppskotið strikar eina markaforðing við tað at samsvar fæst millum heilsutrygdarlógina og lóggávuna í hinum Norðanlondum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing ella fyrisitingarligar sektir. Lógaruppskotið hevur áseting í § 26 a um, at heilsutrygdargjald og renta, ið er fallin til gjaldingar, kann verða innheintað við panting. Harumframt verður heimilað TAKS í § 26 a, stk. 3 at innkrevja skuld og innkrevjingarkostnað sambært hesi løgtingslóg við at afturhalda í A-inntøku hjá teimum gjaldsskyldugu.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld, men heimilar at undantak kann gerast frá gjaldsskravinum.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið leggur heimildir til landsstýrisfólkið. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um viðurskifti viðvíkjandi umsókn og fráboðanarskyldu sambært § 24, stk. 2.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

### 2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

### 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**

**Til nr. 1.**
*§ 24*
Í galdandi Heilsutrygdarlóg er yvirskriftin yvir § 24: "*Gjald fyri 4*". Orðingin er ikki røtt, og verður við hesum lógaruppskoti rættað til: "*Gjald*".

**Til nr. 2.**
*§ 24, stk. 2*
Sambært hesari áseting kunnu persónar, sum eftir § 24 stk. 1, hava skyldu til at rinda heilsutrygdargjald í Føroyum, men sum rinda heilsutrygdargjald í øðrum Norðanlandi vísandi til Nordisk konvention om social sikring, eftir umsókn sleppa undan gjaldskyldu.

Orsøkin til, at krav verður sett um, at borgari skal senda inn umsókn, er, at tað er borgarin sjálvur, ið hevur vitanina um, hvar hann rindar heilsutrygdargjald. Heilsutrygd hevur ikki hesa vitanina.

Undantøkan hevur virknað frá tí degi, umsóknin er móttikin.

Tá ið ein persónur ikki longur rindar heilsutrygdargjald í øðrum Norðanlandi, hevur viðkomandi skyldu til at boða Heilsutrygd frá hesum.

Stk. 2 og 3 verða eftir hetta stk. 3 og 4.

**Til nr. 3.**
*§ 24, stk. 5*
Landsstýrisfólkið ásetir nærri reglur um viðurskifti viðvíkjandi umsókn og fráboðanarskyldu. Landsstýrisfólkið fær hervið heimild til at áseta reglur um mannagongdir í sambandi við umsókn og fráboðanarskyldu sambært § 24, stk. 2.

**Til nr. 4.**
*§ 26, stk. 1*
Í annað punktum í § 26 verður sett áseting um, at Heilsutrygd til nýtslu í sambandi við umsókn um gjaldsfrítøku sambært § 24, stk. 2, kann útvega sær upplýsingar frá øðrum viðkomandi myndugleikum, undir hesum TAKS.

**Til nr. 5.**
*§ 26, stk. 2*
Í § 26, stk. 2 verður sett áseting um, at um ein persónur hevur givið Heilsutrygd skeivar upplýsingar ella tagt um umstøður, sum hava týdning fyri gjaldsfrítøku sambært § 24, stk. 2, kann Heilsutrygd eftirfylgjandi krevja inn gjaldið, ið viðkomandi av órøttum ikki hevur goldið. Gjaldið kann krevjast við at afturhalda løn v.m. eftir reglunum um innkrevjing av persónligum skatti.

*§ 26, stk. 3*

Í § 26, stk. 3 verður ásett, at um ein persónur, ið er fevndur av lógini, ikki rindar gjaldið innan ásettu freist, verður rentutilskriving framd. Rentutilskrivingin er 0,7% fyri hvønn byrjaðan mánað. Sama er galdandi fyri skuldskrivaða rentu. Tað vil siga, at um ein persónur, ið er frítikin fyri at rinda heilsutrygdargjald, ikki uppfyllir treytirnar fyri frítøku, verður her ásett heimild til at upprætta krav og rentutilskriving, um kravið ikki verður goldið til tíðina. Í § 26, stk. 2 verður renturokningin fyri almennum krøvum nýtt. Rentulógin verður ikki nýtt. Grundgevingin fyri hesum er, at tá tað er TAKS, sum innheintar skuldina, verður kravið lagt inn í innkrevjingarskipanina hjá TAKS, og har er rentusatsurin líka fyri øll almenn krøv.

**Til nr. 6.**
*§ 26 a*
Nýggj grein 26 a verður sett inn í lógina og yvirskriftin til greinina verður "*Innheinting av skuld*". Í greinini verða ásettar reglur um innheinting av heilsutrygdargjaldi umframt rentu við panting.

**Til § 2.**
Lógin kemur í gildi 1. juli 2024.

Heilsumálaráðið, 2. januar 2023

**Margit Stórá**
landsstýriskvinna

/ Bjørgfríð Ludvig

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur